TILTØK

Fríkirkjan Oasan
Mánadagin 24. novembur
Kl. 17:00 - 18:15 7up
Kl. 19:00 Bønarmøti
www.oasan.fo

Samkoman Marknagil
Fjalsgøta.2, Tórshavn.
Mánakvøldið kl.20 bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll hjartaliga vælkomin.

Ebenezer
Mikudag kl. 10-12 er løta fyri mammur og børn
Mikukvøld kl. 20: Læru- og bønarmøti
Hóskvøld kl. 20: Ungdómsmøti
Hjartaliga vælkomin
www.Ebenezer.fo

KFUK og KFUM
Týsdagur 25. november kl. 16.30 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Mikudagur 26. november kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur, hetta er fyri ung.
Hósdagur 27. november kl. 15.00 í KFUK: Binditreff, allar kvinnur eru vælkomnar.
Hósdagur 27. november kl. 20.00 í KFUK: Varðmenn hittast. Evni: Hans Andreas Djurhus.

Meinigheitshúsið í Havn
Mánadagur kl21.00 Bønarløta fyri kvinnur og menn hvøt í sær
Týsdagur Kl 20.00 Bíbiltími v / Jógvan Garðsá Luk. 13, 22 - 35
Hósdagin Kl 14.30 Gentukórið venur
Hósdagin Kl 17.00 Gera og bera út jólaheilsanir til tey gomlu
Sunnudagin kl 14.00 Sunnudagsskúli
Sunnudagin kl 18.00 Møti.
Gentukórið syngur

Missiónshúsið við Landavegin
Mikukvøldið møti kl 20.00
Sunnukvøldið møti kl. 18.00 v/Poul Kristoffur Joensen.

Frelsunarherurin í Tórshavn
Mánadagur Kl. 17.00 Club-7up
Mikudagur Kl. 17.00 Bønarmøti
Hósdagur Kl. 20.00 Heimaforbund fyri allar kvinnur
Sunnudagur Kl. 11.00 Halganarmøti Jóannes Fonsdal talar og sunnudagsskúi
Kl. 18.00 Evangeliiskt møti Hans Pauli Højgaard talar og menn úr Rituvík syngja
Øll eru hjartaliga vælkomin

Filadelfia
Landavegur 22, Tórshavn
Mánadagin 24.nov.
Kl. 20.00 Bønarmøti
Mikudagin 26. nov.
Kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum
Fríggjadagin 28. nov.
Kl. 21.00 Húsmøti hjá Naddodd og Sólgerð
Sunnudagin 30. nov.
Kl. 11.00 Morgunmøti við ABC. Tummas Jacobsen talar.
Kl. 19.00 Sellubólkur hjá Samuel
Kl. 19.00 Hugnaløta fyri ung frá 4 fl.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag messa í Kerit kl. 17.30.
www.katolsk.fo

Sjómannskvinnuringurin í Kollafirði
kemur saman inni á SAMBÝLINUM hóskvøldið 27.nov. kl.19.00
Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Saron, Vestmanna
Týskvøldið kl. 19.00 bønarmøti hjá Maritu Hansen, Dalalíð 7.
Øll eru hjartaliga vælkomin

Fríkirkjan við Gjónna
Mánakvøld kl. 20 er bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin

Hvalvíkar Missiónshús
Týsdagin 25.nov. Ungdómsmøti kl.20.00 Mikudagin 26.nov. Bíbiltími kl.20.00 við Árna Kjærbæk Verið hjartaliga vælkomin

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við hugna og kreativiteti.
Sunnudagin kl. 11, Morgunmøti við Ólavi Jacobsen. Barnamøti kl. 11
www.keldan.fo

Lívsins Orð, Runavík
Týskvøldið kl.19,30 Bønarmøti
Týsdag kl.17.30 Liljur
Mikukvøldið kl.20.30 Ungdómsmøti
Hóskvøldið kl.19.00 Undirvísing í kirkjusøgu Sunnumorgun kl.10.30
Møti v/ Jóhan Petur Johannesen
Øll hjartaliga vælkomin

Sjómanskvinnuringurin í Runavík
Sjómanskv. á Eystara armi á Skálafj.
Samlast í Missiónshúsinum á Glyvrum mánakvøldið 24 nov. KL 19.30. Ágot og Óli Poulsen luttaka.

Missiónshúsinum í Rituvík
Mikukvøldsmøti kl. 20:00
Hósdag. Juniorringurin kl. 19:00
Leygardag. Ungdómsmøti/opið hús
Sunnudag.
Sunnudagsskúlu kl. 14:00
møti. Adventhugni kl. 18:00.

KFUM & K Klaksvík
Mikudag
kl.20.00 Bíbliutími
Hósdag
kl.18.00 - 19.00 samlast juniorar. Allir juniorar fáa sms. Um tit vita onkran sum ikki fær sms, vinarliga send so sms við navni og nr til 212480
Sunnudag
Ongin sunnudagsskúli í dag, men familjumøti kl.16.00. Solo Gratia gospelkórið syngur.
Vit fáa Kaffi og rís a' lamande aftaná. Minnist til kl.16.00 Øll hjartaliga vælkomin
kl.20.30 Ungdómsmøti.
Vitja okkum eisini á fb

Soli Deo Gloria
Hósdagin kl 20.00 ungdómamøti við Súsannu Jacobsen
Sunnudagin kl.17.00 bøn
Sunnudagin kl.18.00 lovsangur, tilbiðjan og bøn
Nátturði verður eftir møti øll hava við :)

Missiónshúsið í Skopun
Mikudagin kl. 19.30 bønarløta.
Kl. 20.00 bíbliutími.
Hósdagin kl. 18.00 Podas.
Sunnudagin kl. 14.00 sunnudagsskúli. Kl. 18.00 møti.
Innsavnan til arbeiðið.

Frelsunarherurin Vágur
Mánadagin kl 20.00 Bønarløta.
Týsdagin kl 09.30 Orðið á borðið, kl 20.00 Heimaforbund.
Onsdagin kl 14.15 Barnakórið
Fríggjadagin kl 09.30 Orðið á borðið
Sunnudagin kl 11.00 Sunnudagsskúli. kl 17.00 evang møti v/ Ann-Mari og Sólberg.

Pensionistafelagið í Havn
26. novembur kl. 19,00 verður fundur í Losjuni skipaður sum samgkvøld við harmoniku (Regin Jacobsen o.a.)
3. decembur kl. 19,00 verður adventshugni við rísalamande, holikøkur o.a.
Tekningarlisti liggur frammi. Boða frá luttøku í seinasta lagi 28/11.

Vága Pensjónistafelag
Hugnaløta verður týsdagin 25. november kl. 19 á Sýnini.
Edvard í Skorðini Joensen hugleiðir um Brestis kvæði.
Borðreitt verður við te, kaffi og køkum.
Lutaseðlasøla. Farið verður upp á gólv.

Pensionistafelagið Hugni
hevur hugnaløtið í Bøgøtu 3, tann 25. nov. kl. 17.00. Borðreitt verður við smyrjubreyð. Omaná Rís à la amande og kaffi. Kostnaður kr. 175,- Flystast á kontu 9865 4952191 í Norðoya Sparikassa Kvittanin er atgongumerki. Gjaldast má í seinasta lagið 20 nov. Lutaseðlar verða seldir. NEVNDIN.

Sorgarbólkur fyri vaksin, ið hava mist ein kæran
Bólkurin møtist umleið 3.hvørja viku. Áhugað kunnu venda sær til bólkaleiðararnar.
Margret Mortensen tlr. 223456 og Sigrun Heldarskarð 265432

Vitjunarvinir til Reyða Kross Føroya
Bryggjubakka 2, Tórshavn
Um onkur hevur hug at verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi, eru til vælkomin at ringja til fyriskiparar Eyrith tlf. 513784 ella Marin 284333, teldupost eyrith@redcross.fo ella marin@redcross.fo og redcross@redcross.fo

Virkin sum longst
Vit møtast hvønn mánadag frá kl. 15 til 18 í Sørvágs skúla. Drekkamunnur og køka er at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið Blákollan í Sunda kommunu
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14 til 18. Øll eru vælkomin.

Dagtilhaldið í Vági er byrjað aftur
Opið er týsdag og hósdag frá 15-18
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Losjan í Havn
Tinghúsvegur 18.
Fríggjadagin 28. nov. kl. 4 seinnapartin hittist tilkomin og eldri til jólahugna.

Tilhaldið í Tórsgøtu
21 tlf. 316491/286491
Opið mánadag-fríggjadag kl. 9–16
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Heimasíðan: tilhaldid.fo
Drekkamunnur er til keyps, eins og bløðini eru til taks
Týsdagur 25. nov.
09.00 – 16.00 Motiónsrúmið er opið
09.00 – 16.00 Teldustovan opin
10.00 Sangur verður á Lágargarði. Simme Jacobsen
14.00 – 16.00 Hugnaløta
Mikudagur 26. nov.
09.00 – 16.00 Motiónsrúmið er opið. Opið er hvønn dag
09.00 – 16.00 Teldustovan opin
09.00 – 12.00 Horn- og beinarbeiði
09.00 – 12.00 B. maskinbinding
09.30 Fimleikur menn
14.00 – 16.00 Hugnaløta
Hósdagur 27. nov.
09.00 – 16.00 Motiónsrúmið er opið
09.00 – 16.00 Teldustovan opin
09.00 – 12.00 Veving
10.00 Fimleikur kvinnur
11.00 Lesibólkur kvinnur. Vit lesa: "Boghandleren i Kabul", Åsne Seierstad. Hittast á bókasavninum hósdagin 27. nov.. Aftaná verður jólaborð á Hafnia. Marna Olsen
14.00 – 16.00 Hugnaløta
Fríggjadagur 28. nov.
09.00 – 16.00 Motiónsrúmið er opið
12.00 – 14.00 B. Telduskeið til jóla. Undirvíst verður eftir tørvi hjá tí einstaka. Til ber at hava sína egnu farteldu við
09.30 Fimleikur menn
10.30 Lesibólkur menn. Hittast 28. nov. á bókasavninum á 1 hædd í Tilhaldinum. Vit lesa : "Breiðið krossins merki út ", Njál M. Djurhuus. Torkil Skála
14.00 – 16.00 Hugnaløta
16.30 Kvøldseta
"Brot úr brellbitum – skaldskapur og tónleikur í 15 ár við Linubólkinum í Havnar Sjónleikarafelag.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv.
Vit ynskja, at øll skulu kenna seg vælkomin!

TILTØK

Býli í Føroyum

Raðhús/íbúð í Eysturbýnum í Havn
Raðhús/íbúð í Eysturbýnum, ynskist til keyps ella leigu til sámuligan prís.
568001

Kamar/býli í havn
Stak røkin kvinna søkir kamar/býli í Havn prísur frá 1500-3000. kann vera fyribils ella felags, tað er akut.vinarliga ring til mín Elsebeth
588042

Íbúð ynskist.
Tilkomin friðarlig kvinna søkir íbúð í Havn ella aðrastaðni á Streymoynni. Helst tvey kømur og kostnaður max 5000,- við øllum. Roykji og drekki ikki .
582894

Íbúð til leigu í Havn
100 fermetrar. Tvey kømur, stova/køkur og baðirúm. *Tlf. 260418*

Kamar til leigu
við atgongd til køk, bað, vaskimaskinu, turkitrumlu, fristiboks og tráleyst internet breiðband. Nær við Lærara-skúlan og Sjómaskúlan. *221158*

Dýr

Gásaungar tilsølu !
Gásaungar til sølu fyri kr. 400,- pr. stk.
Ring 233360

Samband

Samband ynskist
Eg eri einkja fyrst í sekstiárunum og eg ynski at koma í samband við vin, sum ikki drekkur ella roykir. Eg eigi hús og bil. Eri einsamøll í húsi og mær tørvar onkran at tosa við. Eg eigi eina dóttur. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 100 Tórshavn
Bill.mrk. 191114

Sjavs

Stór sjavskapping
Stór sjavskapping verður í Róðrarneystinum á Argjum sunnudagin 30. novembur kl.15. Nógvir góðir vinningar m.a gávukort frá Atlantic, ræstkjøt gávubrøv og nógv annað gott. Fleiri sjavsspælarar jú fleiri vinningar. Vinarliga send eitt SMS á 223769 um áhugi er. Ágóðin fer til ein sjavstúr til Íslands fyrst í apríl. 100. kr at lutaka .Eisini vera lutaseðlar.. Øll eru vælkomin. Fyrireikarnir

Út- & Sjónvarp

LEIGA FLATSKERM
LEIGA FLATSKERM 40,42 OG 55 . EINKI DEOPSOITUM,ÓKEYPIS ÚTKOYRING UM ALT LANDIÐ. KEYPSRÆTTUR.

Ymiskt

nýggj vøra heimkomin
vit havað fyngið hópin av nýggjari vøru til jóla. vit eru á býarvegi 100 850 hvalba. TLF. 221259
375259 221259

Til leigu í miðbýnum
Høli uml. 50 fermetrar. Liggur við handilsgøtu í miðbýnum. Vælegnað til handil, skrivstovu ella tænastuvinnu. Hølini er klár at flyta inn í
283067

NØVN



Gullbrúdleyp
Fríggjadagin 28. november hava Katrina og Finnbogi við Gjónna í Fuglafirði gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 29. november saman við familjuni.